# StÍF kann blanda seg

**Strandingar fáa sunnudagin vitjan av Tjaldri, og vinnur StÍF dystin, leggja teir H71 aftur um seg**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tveir dystir vera í 1. deild hjá monnum hetta vikuskiftið.

Leygardagin fara KÍF og Neistin at spæla í Vestmanna. Neistin skal í hesum dysti royna at fáa VÍF aftur, eftir at VÍF vann dystin ímóti H71 hóskvøldið.

Neistin spældi seinasta vikuskiftið javnleik ímóti VÍF, og tað eru tekin um, at Neistin í ár fer at verða drúgvur í oddastríðnum.

Umráðandi er tó hjá havnamonnunum, at teir vinna allar dystirnar móti liðunum longri niðri á stigatalvuni, um teir skulu fylgja við VÍF.



*Neistin má vinna dystin ímóti KÍF, um teir skulu fylgja við vestmenningum í toppinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Dysturin millum KÍF og Neistan verður leygardagin kl. 16.00.

## Gongur framá

Sunnudagin kann StÍF taka seg eitt stig longur upp á stigatalvuni, tá teir fáa vitjan av botnliðnum Tjaldri. StÍF hevur seinastu dystirnar savnað sær stig, eftir at byrjan var eitt sindur trilvandi.

Tjaldur er einasta liðið í deildini, sum ikki hevur fingið nakað stig enn. Í fleiri dystum hevur liðið klára at hótt í fyrra hálvleiki, men síðani er liðið dragnað, tá dysturin hevur liðið móti endanum.

Dysturin millum StÍF og Tjaldur verður sunnudagin kl. 16.00

# Klassikarin er botndystur

**Flogbóltur: Tey bæði mest vinnandi feløgini í føroyskum kvinnuflogbólti, Mjølnir og Fleyr, liggja í løtuni ávikavist niðast og næstniðast í meistaradeildini. Tí er dysturin í dag ikki bert ein klassikari, men eisini ein botndystur**

FLOGBÓLTUR
*Emil L. Jacobsen*

Fram til seinasta kappingarár høvdu bert tvey feløg vunnið føroyameistaraheitið hjá kvinnum. Mjølnir hevði vunnið gull níggju ferðir og Fleyr seks ferðir, men í fjør blandaði Dráttur seg uppí og vann sítt fyrsta føroyameistaraheiti.

Men tað skerst ikki burtur, at tungvektararnir í føroyskum kvinnuflogbólti eru Mjølnir og Fleyr. Tí er tað merkisvert, at hesi bæði liðini í løtuni eru tey bæði niðastu í meistaradeildini. Tað er eisini ein greið ábending um, at breiddin í kappingini er størri nú, enn hon hevur verið.

Dysturin í Havn í dag millum Fleyr og Mjølnir hevur stóran týdning fyri bæði liðini. Um Mjølnirkvinnurnar vinna, fáa tær síni fyrstu stig í kappingini, og tað er ikki ov tíðliga til tað! Vinnur Fleyr hinvegin, økja tær um munin niður til aftasta pláss og økja enn meir um kreppuna, sum gomlu arvafíggindarnir eru í.

Frammanundan er ikki lætt at taka dagar ímillum, hvussu tað fer at ganga. Bæði liðini fingu eina ringa byrjan uppá kappingina, men í seinastuni hava tey bæði havt í framgongd. Men stigini eru enn ov fá.

Hin dysturin hjá kvinnum hetta vikuskiftið verður í morgin í Trongisvági, har suverena oddaliðið TB tekur ímóti ÍF. Sjálvt um TB bara er tvey stig frammanfyri ÍF, hava tær víst sera sannførandi spæl higartil, og ÍF skal hava ein sera góðan dag fyri at vinna dystin í morgin.

## Toppur móti botni

Hjá monnunum er oddaliðið Fram stórfavorittur til at vinna móti botnliðnum ÍF í dag. Fram hevur longu vunnið móti bæði Mjølni, SÍ og Fleyr, og við núverandi styrkini hjá ÍF í huga er lítið sannlíkt, at fuglfirðingarnir gera nakað við formsterka Fram-liðið.

So er hin dysturin í deildini meira opin. Hvørki Fleyr ella Mjølnir hava enn víst tað, sum liðini eru før fyri, og tey eru jøvn í stigum eisini. Tað kann sigast, at hetta er ein dystur um triðja pláss í deildini. Vinnarin hevur framvegis gott samband við oddaliðini Fram og SÍ, meðan taparin verður eitt sindur afturúrsigldur, ið hvussu er fyribils. Á pappírinum sær Fleyr sterkari út, og teir hava eisini heimavøll, so um nakar er favorittur, má tað vera havnarliðið. Men tað kann sum einki verða ein javnur og spennandi dystur.

Tá hetta umfarið er leikt, hava øll liðini spælt móti hvørjum øðrum. Tað kann geva onkrar ábendingar, men heldur ikki meir. Tí grundspælið er ikki komið longur enn í helvt, og í endaspælinum telja stigini so at siga dupult, umframt at liðini tá eru í betri dystarvenjing. So tað er enn nógv eftir at spæla um, hóast onkrar skriftir so smátt eru farnar at hómast á vegginum.



### Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 145 | 94 | 51 | 10 |
| 2 | Stjørnan | 5 | 4 - 0 - 1 | 149 | 114 | 35 | 8 |
| 3 | Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 121 | 103 | 18 | 6 |
| 4 | VB | 5 | 3 - 0 - 2 | 122 | 122 | 0 | 6 |
| 5 | Sóljan | 5 | 1 - 0 - 4 | 111 | 130 | -19 | 2 |
| 6 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 137 | 171 | -34 | 2 |
| 7 | StÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 93 | 144 | -51 | 2 |

### Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 5 - 1 - 0 | 179 | 140 | 39 | 11 |
| 2 | Neistin | 5 | 4 - 1 - 0 | 136 | 126 | 10 | 9 |
| 3 | StÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 134 | 128 | 6 | 6 |
| 4 | H71 | 6 | 3 - 0 - 3 | 162 | 165 | -3 | 6 |
| 5 | KÍF | 5 | 1 - 1 - 3 | 122 | 139 | -17 | 3 |
| 6 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 140 | 159 | -19 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 0 - 1 - 4 | 114 | 130 | -16 | 1 |



# Tjóðveldisflokkurin kann oyðileggja sjálvstýrisgongdina

**Tað eru kreftir í Tjóðveldisflokkinum við so rabiatum meiningum, at tað kann oyðileggja samgongupolitikkin, um tey verða vald á Fólkating. Tað heldur løgmaður, sum stillar upp til fólkatingsvalið fyri at tryggja, at verandi sjálvstýristilgongd kann halda fram við føroyskum stuðuli í donskum politikki**

FÓLKATINGSVAL
*Edvard Joensen*



*Løgmaður og varaløgmaður eru nú farnir at kappast um at sleppa á danating, har annar vil luttaka aktivt, meðan hin als ikki ætlar at blanda seg upp í tað, danir gera*

Tað eru ávísar kreftir í Tjóðveldisflokkinum, sum kunnu vera oyðileggjandi, um tær koma á fólkating. Tað er neyðugt við einum fólkatingsumboði, sum vil luttaka aktivt í donskum politikki, skal nakað líkinda samstarv spyrjast burtur úr, sjálvstýrisgongdini at frama, sigur Annfinn Kallsberg, løgmaður.

Valstríðið upp undir Fólkatingsvalið er byrjað, og tveir av samgonguflokkunum eru farnir at kappast um í minsta lagi annan sessin.

Tjóðveldisflokkurin hevur stillað upp og boðað frá, at hann ætlar sær á Fólkating við teirri stevnuskrá ikki at blanda seg upp í danskan politikk.

– Tað er eingin politikkur, sigur løgmaður, sum vísir á, at skal nakað skilagott fáast burtur úr føroysku sjálvstýrisgongdini, skal samstarv til, og tað fæst bara við at luttaka aktivt í teimum avgerðum, sum tiknar verða á Fólkatingi.

– Sjálvstýristilgongdin skal stýrast úr Føroyum. Men vit hava stórliga brúk fyri einum fólkatingslimi, sum kann og vil samstarva við landsstýrið, sigur løgmaður.

Hann vísir á, at tað er ikki allur Tjóðveldisflokkurin, sum hevur hesa áskoðan. Flokkurin hevur boðað frá, at hann fer ikki at taka lut í donskum politikki, um hann fær umboð á Fólkatingi. Og tað eru partar í Tjóðveldisflokkinum, sigur Anfinn Kallsberg, sum beinleiðis eru ósamd við tí sjálvstýrispolitikki, samgongan rekur. Hildið verður, at tað gongur ov seint, og at meira víðfevnd tiltøk skulu til.

Tey vilja einki hava at gera við tann hóvliga politikkin, Fólkaflokkurin stendur sum borgan fyri. Tey vilja hava konfrontatiónir. Og tað førir onga leið, sigur hann. Tað ber als ikki til at fara á Fólkating við tí endamáli yvirhøvur ikki at diskutera danskan politikk, sigur løgmaður.

Hinvegin hevur tjóðveldisflokkurin á Løgtingi ásannað, at tað er tann sjálvstýrispolitikkurin, sum samgongan, við Fólkaflokkinum á odda, stendur fyri, sum er tann berandi poltikkurin á sjálvstýrisleið.

Hesum hava politikarar floksins her heima so valt at arbeiða undir. Men tað kann væl henda, at eitt møguligt tjóðveldisumboð á Fólkatingi kann fara at reka ein politikk, sum fer at senda dønum heilt onnur signal. Og tað kann gerast vandamikið.

Fólkaflokkurin er einasta trygdin fyri føroysku sjálvstýrisgongdini, tí tað er eingin annar flokkkur, sum kann savna føroyska sjálvstýrisveingin, uttan Fólkaflokkurin, sigur Anfinn Kallsberg.

Eitt tjóðveldisumboð á Fólkatingi við kann virka oyðileggjandi fyri samstarvið millum føroyingar og danir, heldur løgmaður.

# Robert Sund vitjar Havnarkórið

TÍÐINDASKRIV

Havnarkórið sum hevur úr at gera við at fyrireika framførslu av Händels Messias leygardagin og sunnudagin 1. og 2. desember, tekur sær eisini stundir til frammíhjá íblástur.

Kórið hevur nú um vikuskiftið vitjan av gitna svenska kórleiðaranum Robert Sund. Á skránni er bædi klassiskur og rytmiskur tónleikur, við tað at arbeitt verður vid Bachmotettini "Jesus, meine Freude" og við evergreens sum "With á little help", That old lucky sun","Blue skies","The old piano blues" og fleiri av úr somu skuffu.

Ivaleyst verður hetta ein heilt serlig uppliving fyri Havnarkórið og helst eisini fyri áhoyrararnar á konsertini í Norðurlandahúsinum sunnudagin kl. 16.00.

# Amerikanskur løgfrøðingur heldur fyrilestur

TÍÐINDASKRIV

ALMENNUR FYRILESTUR verður á Fiskirannsóknarstovuni hóskvøldið 15. november 2001 kl. 20.00.

Michael Reveal, løgfrøðingur heldur fyrilestur, ið hann kallar: American Workers Compensation Law and Other Insurance Mysteries. Fyrilesturin verður á enskum.

Michael Reveal er løgfrøðingur við "Juris Doctor" frá The University of Hawaii og hevur starvast sum løgfrøðingur í meira enn 10 ár. Tey seinastu árini hevur hann saman við konuni, Lynn, havt egið ráðgevingarvirki við løgfrøði og handli.

Fyrilesturin fer at snúgva seg um tryggingarskipanina í Amerika, um endurgjald í sambandi við arbeiðsskaðar, um hvussu tryggingarvinnan er skipað við atliti at vinnu og stjórnarvaldi. Hann fer at tosa um, hvussu endurgjaldslógin verður tulkað í rættinum og fer at taka fram nøkur dømi úr rættarsøkum. Hann fer eisini stutt at nevna sambandið millum trygging og tryggingarendurgjøld og fer at samanbera skipaninar í Amerika og skandinavisku londunum. Til seinast verður spurningurin, hvørt amerikanarir eru so stevningarhugaðir sum hildið verður, viðgjørdur.

Sí eisini heimasíðuna www.setur.fo/almen.html




Teir tóku land 6
- føroyingar í Grønlandi

Føroyingar í Grønlandi vágaðu lívið. Í 1963 stóðu 24 lík undir børu samstundis í Føroyingahavnini, tá týski trolarin München sakk á veg heim við fullari last. Sama árið fór Blikur at leka í ísinum á Kappanum, og 40 føroyingar noyddust í bjargingabátarnar. Hann sakk, men ein týskur trolari tók menninar upp. Manningin noyddist eisini av skonnartini »Tinganesi«, sum rendi á ein flúr og sakk. Tíbetur kom Vesturvón teimum til hjálpar.




Sætta bókin í røðini Teir tóku land eftir Jógvan Arge ger burturúr sekstiárunum, tá fleiri túsund føroyingar fiskaðu í Grønlandi. Norðafar bygdi framkomið flakavirki í Føroyingahavnini, menn settu seg niður í Grátufjørðinum, og føroyingar bygdu eisini útróðrarhavn á Eggersoy, har sjálvur Kap Farvel er.
Í bókini er yvirlit yvir føroyskar útróðrarmenn í Grønlandi tey árini, tá virksemið var í hæddini. Bókin er 208 síður, prýdd við forvitnisligum myndum, tekningum og kortum

299,-

Jógvan Arge